## Bartal Gregersen, Stranda skúli:



Bartal Gregersen gongur í 10.a í Stranda skúla. Hann gjørdist vinnari í elsta bólkinum í stuttsøgukappingini, sum KT-depilin skipaði fyri. Hann hevur skrivað onkrar stílar fyrr, sum hava verið eitt sindur langir, men hann hevur ongantíð skriva stuttsøgur fyrr.

– Nei, hetta havi eg ikki roynt fyrr. Vit í okkara flokki hava gjørt stílar fleiri ferðir fyrr, men hetta er fyrstu ferð, eg havi skrivað stuttsøgu, men eg haldi, at hetta var spennandi.

*Hvussu ber tað til, at tú valdi at senda eina stuttsøgu inn?*

– Vit skuldu skriva ein krimistíl í skúlanum, og eg haldi, at mín var hampiliga góður, og so gjørdu vit av at senda hann inn til hesa kappingina, og tað gekst jú hampiliga væl.

*Hvaðani fært tú hugskot til ein slíkan krimistíl?*

– Eg havi sæð onkran krimifilm í sjónvarpinum, og so havi eg lagt mær nøkur ting í geyma, sum hava gingið aftur í gjøgnum filmarnar. Hesi tingin royndi eg so at hava við í stuttsøguni, sigur Bartal at enda.





*Í mittasta bólkinum vunnu Óli Hansen og Helgi Lamhauge úr Glyvra skúla fyri søguna »Ein heilsan úr Brazil.« 2. virðisløn fór eisini til Glyvra skúla*

## Óli Hansen & Helgi Lamhauge, Glyvra Skúli:



Óli Hansen og Helgi Lamhauge ganga í 7.a í Glyvra Skúla. Teir vunnu mittasta bólkin í stuttsøgukappingini, sum KT-depilin skipaði fyri. Teir siga seg ongantíð hava roynt tílíkt fyrr.

– Hetta hava vit so ongantíð roynt fyrr. Lærarin bað okkum fara í bólkar ein dagin í skúlanum, og so skuldu vit arbeiða saman uppá at gera eina krimistuttsøgu.

*Hvussu var at arbeiða í bólkum við hesi stuttsøguni?*

– Tað var fínt. Vit komu í bólk saman við teimum, sum blivu nummar 2 í kappingini, men tær koyrdu okkum úr bólkinum, tí tær hildu okkum vera ov óseriøsar, og so vunnu vit. Tað var rættiliga stuttligt.

*Hvussu var at skriva eina tílíka stuttsøgu?*

– Hetta var ringt í byrjanini, tí tað var rættiliga ringt at koma í gongd. Tá vit so fyrst vóru komnir í gongd, so gekst rættiliga væl at skriva.

*Høvdu tit væntað at vunnið?*

– Nei, tað høvdu vit ikki. Vit søgdu til stuttleika, at vit fóru at vinna kappingina, men innast inni høvdu vit nokk ikki heilt roknað við tí, søgdu teir báðir at enda.

# 300 ungir r

**Týsdagin var hátíðarhald í mentamálaráðnum, har virðislønir vórðu latnar ungum rithøvundum, ið høvdu verið við til stuttsøgukappingina, sum KT-depilin hevur skipað fyri í heyst**

SØGUKAPPING

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Í august í ár sendi KT-depilin út skriv til allar skúlar um eina stuttaøgukapping fyri allar fólkaskúlanæmingar í Føroyum. Kappingin var býtt í tríggjar aldursbólkar - 1. – 4. flokk, 5. – 7. flokk og 8. – 10. flokk, við tveimum ymiskum evnum. Yngsti bólkurin kundi skriva ævintýr, meðan hinir báðir bólkarnir fingu høvi at skriva eina krimisøgu.

Tað serliga við júst hesi stuttsøgukapping var, at søgurnar ikki skuldu sendast inn, men leggjast út á ráðstevnu á First Class. Hetta hevði við sær, at næmingar umframt at leggja dent á at skriva eina góða søgu eisini máttu læra seg at nýta First Class. Hertil kann leggjast afturat, at allir skúlanæmingar í Føroyum hava teldupostadressu á First Class.

### Leggja dent á skriving

Kapping er nú at enda komin og vinnararnir eru funnir. 300 stuttsøgur komu inn til kappingina. Serliga var tað aldursbólkurin 5. – 7. flokk, ið vísti kappingini áhuga, meðan framhaldsdeildin ikki var so væl umboðað.

Seinastu árini hevur fólkaskúlin sum heild lagt nógvan dent á at fáa næmingar at skriva. Fyri nøkrum árum síðani gav Føroya Skúlabókagrunnur tríggjar bøkur út um ávegisskriving, "Kom og skriva 1, 2 og 3", sum Birgit Arge og Lydia Didriksen hava skrivað. Hesar bøkur leggja upp til, at næmingar arbeiða við at skriva ymiskt og alla tíðina bøta um tað, teir skriva. Evnini, ið verða tikin upp í hesum bókum, eru sera ymisk og spennandi, so børnini í dag rættiliga fáa høvi at royna síni skrivievni.

### Størstur áhugi hjá 11-13 ára gomlum

Um evnini – ævintýr og krimisøgu – kann sigast, at tey er væl vald. Bæði evnini eru ímillum evnini í "Kom og skriva", so næmingarnir kunnu arbeiða við, hvussu tílík søga kann skrivast, áðrenn teir seta seg at skriva sjálva søguna. Til ber at gera forarbeiðið í bólkum, og júst ein av vinnraasøgunum, nevniliga tann fyri 5. – 7. flokk, var vunnin av tveimum dreingjum, sum høvdu skrivað søguna í felag, og arbeitt við henni í bólki.

At áhugin er størstur ímillum tey 11 – 13 ára gomlu,